# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi ongantíð tosað við guvernørin um sæti mítt í Senatinum, og tað hava míni fólk heldur ikki gjørt*
*Barrack Obama*

## Mugabe er sum Hitler



*- Mugabe er aldarinnar Hitler, sigur suðurafrikanski biskupurin*
*Mynd: Polfoto*

**Tann anglikanski biskupurin í Suðurafrika heldur, at tað ber væl til at samanbera Robert Mugabe við Adolf Hitler**

- Stýrið hjá Mugabe hevur elvt til so nógvar ræðuleikar við líðing og deyða, at hann má roknast sum aldarinnar Hitler.

Tað sigur anglikanski biskupurin í Suðurafrika, Joe Seoka, við blaðið The Times.

Hann heldur, at tann 85 ára gamli zimbabwiski forsetin eigur at koma fyri Altjóða Revsidómstólin í Haag fyri síni brotsverk. Sjálvur mælir biskupur suðurafrikonsku myndugleikunum til at brúka landsins halgidag, sum er tann 16. desember, til at biðja fyri semju í Zimbabwe og fyri, at Mugabe noyðist at fara frá.

- Hann eigur at verða koyrdur frá, so Guðs børn sleppa undan fleiri líðingum, sigur Joe Seoka, biskupur við The Times.

Zimbabwe er í stórari politiskari og búsksparligari kreppu, og har er trot á næstan øllum vørum. Næstan helmningurin av fólkinum hevur tørv á mati, og fleiri hundrað fólk eru deyð av kolera í seinastuni.

## ES til reiðar at viðgera umsókn úr Íslandi

Sendir Ísland umsókn um limaskap í ES, kann samveldið viðgera hana beinanvegin

Enn hevur íslendska stjórnin ikki tikið nakra avgerð um møguliga umsókn um limaskap í ES, men skuldi tað hent, at stjórnin sendi eina umsókn til Bruxelles, fær hon ætlandi skjóta viðgerð.

- Vit hava ikki fingið nakra umsókn, men kemur hon nú, kunnu vit viðgera hana beint eftir ársskiftið, segði Olli Rehn, kommiserur, við tíðindafólk í Bruxelles í gjár.

Sjálfstæðisflokkurin hjá Geir H. Haarde, forsætisráðharra fer at halda landsfund í januar, og sambært Morgunblaðnum skal flokkurin tá taka støðu til, hvørt Ísland skal senda eina umsókn til Bruxelles ella ikki. Og sambært Olli Rehn verður ein íslendsk umsókn ikki løgd til viks.

- Vit kunnu viðgera hana longu í næsta mánaði, sigur hann.

## Skotin niður við hjálp frá CIA

**Við hjálp frá amerikonsku fregnartænastuni vórðu 15 smá flogfør skotin niður í loftrúminum hjá Peru í nítiárunum**



*Amerikonsku trúboðarahjúnini og børn teirra vóru í hesum flogfarinum, sum bleiv skotið niður við hjálp frá CIA*
*Mynd: AP*

Fleiri av flogførunum vórðu skotin niður uttan ávaring. Í fleiri førum vórðu flogførini skotin niður, beint eftir at loftverjan hevði sæð tey, og uttan at myndugleikarnir góvu sær stundir til at kanna, hvør ella hvat var í teimum.

Í nítiárunum hevði loftverjan í Peru hevði ikki ta neyðugu tøknina til at halda eyga við flogførum, og tí gjørdi landið eina avtalu við amerikonsku fregnartænastuna CIA um at hava eftirlit við landsins loftrúmi. Hendan avtalan kom í gildi í 1995 og vardi til 2001.

Orsøkin til at avtalan fór úr gildi í 2001 var, at eitt flogfar við einum amerikonskum trúboðarahjúnum bleiv skotið niður yvir Peru. Veronica Bower og sjey mánaðir gamla dóttirin Charity doyðu, meðan maðurin og seks ára gamli sonurin sluppu livandi frá tilburðinum. Flogskiparin bleiv særdur, men megnaði at neyðlenda.

Tað er Pete Hoekstra, sum hevur avdúkað tað loyniliga samstarvið millum CIA og myndugleikarnar í Peru. Hann er formaður í verjunevndini í Umboðsmannatinginum og er úr republikanska flokkinum. Hoekstra sigur við AP, at tey flestu flogførini vórðu skotin niður uppi yvir frumskóginum í Peru og vórðu ongantíð funnin aftur.

- Bower-húskið kundi fingið somu lagnu, um teirra flogfar var endað í frumskóginum sigur hann.

Í 2002 gjørdi stjórnin hjá George W. Bush, forseta eina semju við Bower-familjuna og flogskiparan um átta milliónir dollarar í endurgjaldi.

**STUTT SAGT**

### Nýtt tilboð úr Venezia

Hotelleigarar í Venezia í Italia eru ikki ráðaleysir, nú áhaldandi regn og álandsvindur hava lagt ein stóran part av býnum undir í vatni og sjógvi. So ístaðin fyri tann summarliga príslistan „Sól í Venezia“ hava hotellini gjørt eitt nýtt tilboð, sum eitur „Flóð í Venezia“. Saman við uppihaldinum fáa gestirnir eitt (sjó)kort av gonguleiðum í býnum og sjálvandi eitt par av gummistyvlum.

Býarmyndugleikarnir í Venezia siga, at tað hevur ikki verið so stór flóð í býnum í umleið fjøruti ár.

### Finskur ráðharri lagt frá sær

Finski mentamálaráðharrin, Sari Sarkomaa, boðaði í gjár frá, at hon fer burtur úr stjórnini, men at hon verður sitandi í embætinum, til ein avloysari er funnin.

Hon segði í tíðindaskrivi, at hon vil hava betri tíð til mannin og tey trý børnini.

Sari Sarkomaa, sum er 43 ára gomul, hevur sitið í finska tinginum síðani 1999, og hon hevur verið ráðharri í mentamálum, síðani stjórnin hjá Matti Vanhanen tók við í apríl í fjør.



*Sari Sarkomaa gevst sum ráðharri*
*Mynd: Aftenposten*

### Bush tann ringasti

48 prosent av teimum amerikonsku veljarunum halda, at George W. Bush er tann ringasti forsetin, sum USA nakrantíð hevur havt. Tað vísir ein meiningakanning, sum blaðið The Wall Street Journal og sjónvarpið NBC hava gjørt.

Beint áðrenn Bill Clinton fór frá fyri átta árum síðani, søgdu 18 prosent av teimum spurdu, at hann var tann ringasti í landsins søgu.